# Reglugerð um tænastuferðir

## Grein 1

Starvsnevndarlimir, sum ferðast ~~uttanlands~~ í ørindum fyri SSF, hava rætt til fult endurgjald fyri teir kostnaðir, sum standast av hesum virksemi. Somuleiðis hava landsliðsvenjarar, ferðaleiðarar og onnur hjálparfólk í landsliðsørindum rætt til fult endurgjald fyri teir kostnaðir, sum standast av hesum virksemi, í tann mun sum ikki annað er ásett í sáttmála við hesi.

## Grein 2

Kostnaðir sum koma undir Grein 1 eru fyri ferðing, kost og gisting.

## Grein 3

Starvsnevndin skal hava givið loyvi til tænastuferð ~~uttanlands~~, áðrenn ferðin kann byrja.

## Grein 4

Útreiðslur til ferðing við flogfari, skipi ella bussi o.t. verða endurgoldnar eftir rokning. Ferðing eigur at fara fram á bíligasta hátt.

## Grein 5

Fyri innivist verða rímiligar útreiðslur goldnar ímóti rokning, eftir avtalu við forfólk SSF.

Um gist verður privat verður einki endurgjald latið.

## Grein 6

Rindað verður 700 kr. í A-inntøku fyri hvønn ferðadag, íroknað bæði fráfaringar- og heimkomudag, til tey í grein 1 nevndu.

## Grein 7

Í seinasta lagi eina viku eftir heimkomudagin skulu tey í grein 1 nevndu hava latið endaligu ferðauppgerð við øllum neyðugum skjølum til skrivstovuna hjá SSF.

## Grein 8

Tá starvsnevndin hevur góðkent ferðauppgerðina verður endurgjaldið rindað.

*Góðkend av aðalfundi hjá Svimjisamband Føroya ~~13. apríl 2024~~ 20. mars 2025*.